# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Henrik Old, løgtingsmaður

**Svarari:** Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

**Evni:** Útkoyring av heilivági í Suðuroy

**Spurningar:**

1. Hví kann góða tænastan, har privat fólk koyra heilivág út frá Suðuroyar Apoteki, ikki halda fram?
2. Kann landsstýrismaðurin tryggja, at tænastan til brúkaran framyvir verður á sama høga støði?
3. Hvussu nógvar privatar tænastur á heilsuøkinum skal Posta yvirtaka, sum feløg og einstaklingar veita til føroyingar?

**Viðmerkingar:**
Í longri tíð hava privat fólk koyrt heilivág út frá Suðuroyar Apoteki til syðru helvt av Suðuroynni. Hendan skipanin hevur verið stak góð. Sjálvt um brúkarin ikki hevur verið heima, tá heilivágurin kemur, so hevur borið til at heinta heilivág hjá tí, sum koyrir hann út.

Tíverri sær út til, at hendan skipanin ikki fær loyvi til at halda fram, og sum skilst er ætlanin, at Posta skal yvirtaka útkoyringina av heilivági til syðru helvt av Suðuroynni.

Tænastan hevur riggað framúr væl, og fólk hava verið væl nøgd við hana. Tí kann mann ivast í, um tænastan framyvir verður tann sama. Hetta setur eisini spurnartekin við, hvussu nógv Posta skal yvirtaka av privatum tænastum á heilsuøkinum, sum einstaklingar og feløg veita.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

**Á Løgtingi, 12. mai 2022**

Henrik Old